**Semja**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**og**

**YTF**

**galdandi fyri Elektron**

Omanfyri nevndu partar eru samdir um at broyta ásetingar í verandi sáttmála soleiðis:

1. **Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:**

   1. juni 2023 hækkar lønin við 3,75%
   1. juni 2024 hækkar lønin við 4,04%

2. **Grein 5, stk. 4 sum ljóðar soleiðis:**
   *"Stk. 4. Um lønarsamrøðan ikki er hildin innan 1. november, verður lønarískoyti fyri starvsfólk, sum ikki hava havt lønarsamrøðu, hækkað samsvarandi lønarhækkingini á minstulønunum afturvirkandi frá 1. juni. Leiðslan innkallar til lønarsamrøðu við í minsta lagi 14 daga freist. Um avtala ikki fæst í lag, ella um starvsfólkið ikki møtir til samrøðuna, áliggur tað starvsfólkinum at avtala eina nýggja lønarsamrøðu í samráð við leiðsluna. Heldur starvsfólkið ikki nýggju avtaluna, verður lønarískoytið óbroytt."* verður strikað og nýtt stk. 4 verður sett inn soljóðandi:

   *"Stk. 4. Mánaðarlønin hækkar sambært sáttmálanum."*

   Broytingin er treytað av, at arbeiðið við at endurskoðað lønarviðurskiftini, so sum flokkingar, minsta løn og ískoyti, nærri lýst í punkt 5 í semjuni, verður liðugt og góðkent áðrenn 1. mai 2024. Kemur arbeiðið ikki á mál áðrenn freistina, verður farna orðing sett inn aftur.

3. **Grein 16, stk. 2, fyrsta petti sum ljóðar soleiðis:**
   *"Fyritøkan letur árliga kr. 600 fyri hvørt fulltíðarsett starvsfólk í útbúgvingargrunn, og fyri parttíðarsett kr. 300."* verður strikað og nýtt stk. 2. verður sett inn soljóðandi:

   *"Til útbúgvingargrunnin letur Elektron 1% av 1/12 av lønum uttan gjøld undir starvsfólkaútreiðslunum sambært roknskapinum hjá felagnum árið fyri, og verður gjaldið flutt felagnum fyrst í juli. YTF bindur seg til at geva FAG árligan roknskap yvir, hvussu upphæddin í útbúgvingargrunninum verður nýtt."*

4. **Uppskot til leist um tryggingar:**
   Partarnir eru samdir um at fara undir at endurskoða arbeiðsgevaragoldnu tryggingarnar. Framtíðarleisturin skal vera, at YTF saman við arbeiðsgevarunum og Føroya Arbeiðsgevarafelag arbeiða við tryggingunum í sáttmálaskeiðnum.
   Hetta arbeiðið skal gerast áðrenn krøv vera handað, og tíðarhóskandi er um heystið árið fyri sum samráðingar byrjar.
   Hetta arbeiðið inniber, at tryggingarfeløgini gjøgnumganga fyri pørtunum, har partarnir fáa innlit í hvørjar tryggingar limir í YTF hava, hvørjar tryggingar eru best hóskandi og um nakrar tryggingar ella tryggingartreytir eru broyttar.
   Semjast partarnir um broytingar, verður hetta síðani tikið við til komandi samráðingar.

5. **Uppskot til leist um lønarviðurskifti í sáttmálanum**
   Arbeiðið við at endurskoða lønarviðurskifti, so sum flokkingar, minsta løn og ískoyti, heldur fram í sáttmálaskeiðnum. Tá arbeiðið er liðugt, verður tað í sáttmálaskeiðnum lagt fram fyri pørtunum til endaliga góðkenning. Hetta arbeiðið skal vera liðugt innan 1. mai 2024.

6. Í grein 23 verður "*1. juni 2021*" broytt til "*1. juni 2023*" og "*31. mai 2023*" broytt til "*31. mai 2025*".

7. Sáttmálin verður gjøgnumgingin og tilvísingar og feilir verða rættaðir.

**Tórshavn, 23. mai 2023**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Jórun Gardar, samráðingarleiðari

**Fyri YTF**

Durita Kjærbo, forkvinna